## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 27. apríl 2023, kl. 17.00

Áðrenn fundin greiddi Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, frá, at síðani skráin varð løgd, er eitt nýtt mál innkomið. Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um at loyva, at málið verður sett á skrá. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti. Málið verður sett á skrá sum mál nr. 184.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 179**
Sp/f Vestrol – umsókn um loyvi til íbúðarbygging í smiðjuni
J.nr.: 200002-8-2021

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi 18. apríl 2023 umsókn frá Dánjal í Skálum vegna Sp/f Vesttrol um fyribils byggiloyvi til tvær íbúðir í ovastu hædd á smiðjubygninginum á matr.nr. 249f, Heyganesgøta 1.

Nevndin samtykti á fundi 20. mars 2023 at spyrja løgfrøðing um, hvussu kommunan kann tryggja sær ikki at koma undir endurgjaldsskyldu í samband við at loyva møguligari íbúðarbygging í smiðjubygninginum.

Løgfrøðingur hevur boðað frá, at tað ikki er neyðugt hjá kommununi at tryggja seg ímóti endurgjaldi, men um kommunan ynskir tað, so kann hetta gerast við orðing í einum komandi byggiloyvi.

Bygningurin liggur á havnarøki, og ásetingarnar í byggisamtyktini fyri havnarøki loyva ikki íbúðarbygging.

Nevndin mælir til at broyta ásetingarnar fyri bygningi soleiðis, at ovasta hæddin verður broytt til mistaðarøki A2.

**Viðv. 179**
Tilmælið frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 180**
Umsókn frá Bátastevnunevndini um stuðul til Bátastevnuna 2023.
J.nr.: 2000002-19-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 27. mars 2023 umsókn frá Bátastevnunevndini um stuðul til Bátastevnuna 2023.

Bátastevnunevndin søkti í skrivi dagf. 9. mars 2023 um kr. 50.000 í stuðli til Bátastevnuna 2023.
Nevndin samtykti at mæla til at stuðla við kr. 50.000.

**Viðv. 180**
Bygdarráðið samtykti einmælt at stuðla við kr. 50.000.

**Mál 181**
Eykajáttan til at tryggja spæliplássið oman fyri skúlan
J.nr.: 400002-2-2020

Mentanarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. mars 2023 mál um at tryggja spæliplássið oman fyri skúlan. Í 2021 samtykti bygdarráðið tilboðið frá Arta (fyrr Prull) á kr. 386.000 á fíggjarætlanini fyri 2022.

1. partur av arbeiðinum á kr. 128.700 varð gjørt í 2022 fyri tilfarið, men arbeiðið bleiv ikki liðugt og bygdarráðið hevði ikki møguleika at viðgerða málið til fíggjarætlanina fyri 2023.

Fyri at fáa arbeiðið liðugt hevur Arta givið kommununi nýtt tilboð á kr. 116.700 u/mvg dagfest 13. februar 2023.

Málið varð viðgjørt á fundi hjá Bygdarráðnum tann 23. februar 2023 og varð beint aftur í nevnd.

Mentanarnevndin skeyt upp á fundi tann. 20. mars 2023 at eykajáttanin á kr. 116.700 u/mvg verður fíggjað av "keyp av tænastuveitingum annars" innan raksturin hjá Mentanarnevndini.

Fíggjarnevndin viðgjørdi uppskotið hjá Mentanarnevndini á fundi tann 22. mars 2023. Nevndin samtykti einmælt at mæla til at samtykkja eykajáttan sum omanfyri lýst við 1. viðgerð.

Bygdarráðið viðgjørdi tilmælið frá Fíggjarnevndini 30. mars 2023 og samtykti einmælt eykajáttanina við 1. viðgerð.

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi 20. apríl 2023 málið og samtykti einmælt at mæla til at samtykkja eykajáttan við 2. viðgerð.

**Viðv. 181**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 2. viðgerð.

**Mál 182**
Umsókn frá Daniel Djurhuus Rein um hýruvognsloyvi
J.nr. 2211002-1-2023

Daniel Djurhuus Rein, søkir um hýruvognsloyvi.

Kunngerð nr. 33 frá 30. mars 1983 um eina standard hýruvognsreglugerð, sum broytt við kunngerð nr. 139 frá 7. desember 1990, heimilar kommunum at geva hýruvognsloyvi.

Fíggjarnevndin mælir til at játta hýruvognsloyvið, treytað av at øll onnur loyvir eru í lagi, m.a. at umsøkjarin hevur førarabræv til fólkaflutingin móti gjaldi. Loyvið eigur at vera givið fyri 5 ár í senn.

**Viðv. 182**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 183**
Umsókn frá Øssur Christiansen, Náttbussurin TAXI, um at endurnýggja hýruvognsloyvi
J.nr. 2211002-2-2023

Øssur Christiansen, Náttbussurin TAXI, søkir um at endurnýggja hýruvognsloyvi.

Kunngerð nr. 33 frá 30. mars 1983 um eina standard hýruvognsreglugerð, sum broytt við kunngerð nr. 139 frá 7. desember 1990, heimilar kommunum at geva hýruvognsloyvi.

Fíggjarnevndin mælir til at játta hýruvognsloyvið, treytað av at øll onnur loyvir eru í lagi, m.a. at umsøkjarin hevur førarabræv til fólkaflutingin móti gjaldið. Loyvið eigur at vera givið fyri 5 ár í senn.

**Viðv. 183**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 184**
Val av nevndum og umboðum
J.nr.: 22042-1-2020

Vísandi til grein 2 í grindakunngerðini, kunngerð nr. 9 frá 26. januar 2017 um grind og annan smáhval, skal sýslumaðurin til hvørja hvalvág uppnevna 4 grindaformenn og 2 tiltaksfólk harumframt.

Sýslumaðurin, Kristian Martin Joensen heitir á Vestmanna Bygdarráð um at ummæla 4 grinda-formenn og 2 tiltaksfólk.

Grindamenn í Vestmanna hava skotið upp at velja:
Jóni Durhuus
Jan Erik Tørslev Pedersen
Niels Thomas Pedersen
Bjartur Tórhalsson

Varagrindaformenn: Torstein Brattaberg og Jóan Hendrik Isaksen

**Viðv. 184**
Bygdarráðið samtykti einmælt at viðmæla omanfyri.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17:40

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Bjørg á Rógvi | Sára Jógvansdóttir | Laila Haldansen |
| Anja Haldansen | Ingi Olsen | Eyðun Hansen |